

# Filmur við Jim Carrey bannaður í Egyptalandi

**Kendi sjónleikarin og uttan iva ein av størstu skemtarunum í 90´unum Jim Carrey er aktuellur á heili trimum rásum í hesi vikuni - tv3+, Dr1 og á Canal+**

Bruce Almighty" og "The Matrix Reloaded" bannaðir
Seinasti filmurin við Jim Carrey "Bruce Almighty" bleiv seinasta fríggjadag bannaður í Egyptalandi. Madkour Thabit, ið er leiðari á statsstýrda films- og útvarpseftirlitinum, fanst at filminum, tí tann eini sjónleikarin leikti leiklutin sum Gud: "Heitið á filminum - ´Bruce Almighty` - sipar til onkran, sum megnar at gera alt. Tílíkir eginleikar kunnu einans tilskrivast Gudi." Soleiðis segði Thabit í einum faksi til The Associated Press.

Í summar bleiv "The Matrix Reloaded" eisini bannaður. Tá var orsøkin í høvuðsheitum átrúnaðarlig, men eisini orsakað av at í filminum var "áhaldandi harðskapur". Sami Madkour Thabit segði tá, at eitt sokallað filmsráð við 15 filmsatfinnarum, akademikarum, høvundum og sálarfrøðingum, hevði lagt fram eitt skriv, har sagt var, at filmurin snúði seg um átrúnaðarlig viðurskiftir viðvíkjandi tilveruni og skapanini. Uttan at fara í smálutir varð sagt at kreppur fyrr høvdu tikið seg upp orsakað av slíkum filmum. Men ein filmsummælari í Egyptalandi, Abdel Fatah, segði, at islamiska pressan frammanundan ofta hevði ført fram, at slíkir filmar, eins og fyrsti parturin av Matrix, eru til fyrimuns fyri zionismuna og at teir lýsa og birta lív í ziontisk hugskot og hugmyndir. Orsakað av hesum hava myndugleikarnir verið sera ansnir, segði Abdel Fatah við Guardian.

**Jim Carrey**
Men aftur til Jim Carrey og filmar hansara, sum koma í vikuni.
Á Tv3 í filminum "Ace Ventura 2 - Náttúran kallar", hevur Jim Carrey høvuðsleiklutin sum tann ørligi djóradetektivurin. Hetta er annar partur um Ace Ventura, sum heitt verður á, um okkurt heilt álvarsligt er áfatt í djóraheiminum. Í hesum filminum skal hann forða fyri einum kríggi millum tvey ættarfólk djúpt inni í Afriku. Her skal hann finna eina hvíta flogmús og hann verður noyddur at fara ígjøgnum fleiri mannminkandi royndir.

The Mask kemur leygarkvøldið kl. 21.00 á Dr1. Har hevur Jim Carrey leiklutin sum vanligi bankamaðurin, Stanley Ipkiss, sum finnir eina grøna masku. Tá hann roynir maskuna broytist alt. Einki er ófort, tá hann er í maskuni og maskan kemur eisini væl við, eftirsum at hann er skotin í tí vøkru Tinu (Cameron Diaz). Men tað eru onnur, sum eisini vilja hava fatur í hesi maskuni.

Men Jim Carrey er eisini við í meiri álvarsomum filmum. Ein av hesum slagnum er sera væl eydnaði filmurin við Jim Carry "The Man on the Moon", sum herfyri var á Tv3. hesin filmurin er um skemtaran Andy Kaufman, sum fær eina deyðiligа sjúku.
The Majestic fellir undir dramasjangruna. Filmurin snýr seg um handritahøvundan Peter Appleton, sum vaknar í Lawson aftaná eitt ferðsluóhapp, ið hevur ført við sær minnistap. Fleiri í býnum halda, at hann er burturmisti sonur býarinnar og krígshetjan, Luke. Býurin misti fleiri menn undir 2. Veraldarbardaga. Appleton minnist ikki sítt navn og ivast í, hvør hann er. Men hann livir eitt lýtaleyst lív á einari fullkomnari lygn í Lawson. Men sannleikanum sleppur hann ikki undan...





**Komandi filmur**
Eftir tann væl dámda filmin "Bruce Almighty", verður Jim Carrey við í einum størri skemtifilmi, sum skal hava frumframførslu í 2005. Hesin filmurin snýr seg um ein US Air Force flogskipara, ið er úti fyri eini álvarsligari vanlukku. Eftir hetta verður hann settur saman aftur, so at hann er hálvur gummi og hálvt menniskja. Hetta er ein satirisk endurgering av amerikanska sjónvarps klassikaranum úr 1970´unum "The Six Million Dollar Man".





